**Bráneyðugt við hjálparpakka**

**Ógvusligur prísvøkstur seinastu árini hava gjørt, at nógvar familjur eru ógvuliga sperdar, og hava ilt við at fáa endarnar at røkka. Hjálparfelagsskapir, fakfeløg og onnur hoyra hvørja viku frá fólki, sum ikki eiga fyri mat, og støðan er hættislig. Neyðugt er at handla skjótt, so fólk kunnu fáa ein lætta í ár. Ein skattalætti komandi ár fer at muna hjá nøkrum, men tað er ein bráfeingistørvur, sum neyðugt er at taka støðu til beinavegin, tí støðan nógvastaðni er hættislig**

Neyðugt er við málrættaðari hjálp beinanvegin, tí má politiska skipanin seta nýtt hjálparískoyti í verk, so at fíggjarliga sperdar familjur longu í næsta mánaða kunnu søkja um hjálp.

Líknandi skipan hevur verið í gildi áður, og tí er ikki stórvegis av nýggjum løgfrøðiligum arbeiði, ið skal gerast, og Almannaverkið hevur mannagongdir og royndirnar at handfara hetta.

Neyðugt er eisini at dagføra inntøkumørkini fyri, hvør kann fáa hjálp – her meinast bæði við bráfeingis hjálparískoyti og fyri familjuískoyti hjá barnafamiljum.

Fyri eitt par við børnum eigur hjálpin ikki at fella burtur fyrr enn inntøkan er omanfyri tvær arbeiðaralønir, og fyri støk við børnum eigur hjálpin ikki at fella burtur fyrr enn inntøkan er omanfyri 1,25 arbeiðarainntøku. Er talan um familju við 3 børnum ella fleiri eigur inntøkumarkið at vera 20% hægri.

Vit vita, at ógvuliga nógv hava tað trupult, og nú veturin og jólini stunda til vita vit, at nógvar familjur vita ikki síni livandi ráð.

Prísvøksturin hevur verið stórur seinastu 4 árini - knapt 20% - og lønirnar eru verri enn so fylgdar við. Rentur, húsaleiga og matvøruprísir eru ógvuliga nógv hækkað, og hetta merkist allastaðni. Tað sansar veruliga at, og vit noyðast sum samfelag at taka ábyrgd, hóast orsøkirnar til íkomnu støðuna koma uttanífrá.

Undirritaðu feløg heita tí á politisku skipanina, um at fáa ein nýggjan hjálparpakka í løgtingið sum skjótast, so familjur kunnu søkja og fáa hjálp í komandi mánaði.

Vegna fakfeløgini,

Georg F. Hansen, formaður í Føroya Arbeiðarafelag
Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag
Heri Reynheim, formaður í Havnar Arbeiðarafelag
Jastrid Niclasen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Absalon Hansen, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag
Sonja J. Jógvandóttir, samskipari í Samtak